**Millum**

**Starvsmannafelagið og SEV**

**er henda semja gjørd**

**§ 1**

Lønin hækkar:

| | |
|---|---|
| • 1. oktober 2006 | 0,60 % |
| • 1. oktober 2007 | 3,00 % |
| • 1. oktober 2008 | 3,00 % |
| • 1. oktober 2009 | 3,00 % |

**§ 2**

1. oktober 2007 verður eftirlønargjaldið nettofiserað og er tá 15,5%

**§ 3**

Í sáttmálanum verða hesar broytingar gjørdar:

§ 1, *Stk. 5*. Verður orðað soleiðis:
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrættin.

§ 3, *stk. 11* verður orðað soleiðis:
Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti. Tænastufrí kann verða givin í upp til 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi 4 ár.

Nýtt stk. 3 í § 4 verður orðað soleiðis:
*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Starvsmannafelagnum.
Verandi *Stk. 3* verður til *Stk. 4*.

§ 17 verður orðað soleiðis:
*Stk. 1.* Vanliga arbeiðstíðin er 36,5 tímar um vikuna, mattíð ikki íroknað. Arbeiðstíðin verður at leggja í samráð millum leiðsluna og starvsfólkini, tó soleiðis, at leygardagur verður frídagur, har hetta letur seg gera. Arbeiðstíðin hjá linjuformonnum er 40 tímar um vikuna, mattíð ikki íroknað.
*Stk. 2.* Niðursett arbeiðstíð kann verða loyvd, har umstøður eru til tess. Lønin verður tá lækkað í mun til arbeiðstíðina við 1/36,5.

Í § 29, *stk. 1,* litra b) verður síðsti setningur orðaður soleiðis:
Tímalønin verður roknað sum 1/1898 av árslønini ella 1/158 av mánaðarlønini.

§ 37 Verður orðað soleiðis:
*Stk. 1.* Báðir partar kunnu siga hendan sáttmála upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1/10-2010.
*Stk. 2.* Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum, Tá kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.
*Stk. 3.* Áðrenn sáttmálin endaliga kemur í gildi treytar S.E.V. sær, at Fíggjarmálaráðið góðkennir sáttmálan.
*Stk. 4.* Partarnir eru samdir um 1. oktober 2008 at umrøða § 32 í sáttmálanum, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum.
Henda áseting kann ikki føra til, at sáttmálin verður uppsagdur í sáttmálaskeiðnum.

Í **"Fylgiskjali um flokkan og lønir"** verða hesar broytingar gjørdar:

**4. Starvsinnihald**
Serliga útsett størv kunnu verða flokkað í V. lønarflokki óheft av útbúgvingarkrøvum.

**Vaktargjøld**
Vaktargjald 1 verður 18% av tímalønini í 3.1
Vaktargjald 2 verður 36% av tímalønini í 3.1

Hesar umflokkingar verða gjørdar:

- Leiðsluskrivari flytur upp í 5. flokk
- Serfrøðingar I flyta upp í 7. flokk
- Serfrøðingar II flyta upp í 8. flokk
- Deildarleiðarar 3 skulu ganga tey 7 stigini frá 30 til 36

Í **7. EDV-leiðarastørv** verða reiðuviðbøturnar broyttar soleiðis:
EDV-leiðari I 3.000,-
EDV-leiðari II 3.300,-

Tórshavn, hin 28. februar 2007

| **Starvsmannafelagið** | **SEV** |
|---|---|
| Gunnleivur Dalsgarð / Anna Johannesen | Leivur Hansen |
| Selma Ellingsgaard | Klæmint Weihe / John P. Danielsen |
| Niels á Reynatúgvu | |
| Eimi Fossdalsá | |
| John Kjær | |